# Nøvn

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



**90 ára føðingardagur**
Mikudagin, 9. juni verður Solveig Olafsson Joensen, Dalagøta 9 í Havn 90 ár. Tey, ið vilja gleða hana henda dagin, eru vælkomin í heimið frá kl. 14.

## Sigrid Ewald í Smiðjuni



Hósdagin 10. juni letur ein málningaframsýning hjá listakvinnuni Sigrid Ewald upp í Smiðjuni í Lítluvík.

Sigrid, sum er fødd í 1957, býr í Kalifornia og hevur sína útbúgving á Kunstakademie Berlin og á San Francisco Art Institute.

Hetta er aðru ferð at Sigrid, sum lýsir Føroyar við sínum málningum, hevur framsýning í Smiðjuni.

Framsýningin er opin til og við mikudagin 16. juni. Allar dagar frá kl. 10-19, tó mikudagin til kl. 14.

†

ANDLÁT

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**Erling Simonsen, Tórshavn,**

andaðist á Tjarnargarði fríggjadagin 4. juni 78 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni mikudagin kl 13.

***Familjunnar vegna***

***Jórun, Erlendur og Rannvá***

Tey, ið vilja minnast Erling, kunnu lata Parkinsonsfelagnum eina gávu, konta í peningastovnunum.

# Markering á hægsta fjalli í Kunoy

**Leygardagin varð ein koparpláta við ymiskum sitatum sett upp á hægsta punktið á Kunoynni.**

Magnus Gunnarsson



*Sjúrður Kunoy slær seinasta seymin í steinin*

Tað vórðu brøðurnir Sjúrður og Djóni Kunoy, sum leygardagin gingu niðan á hægsta fjall á Kunoynni, Kúvingarfjall, at seta upp eina koparplátu við ymiskum sitatum, sum eru graveraði í plátuna. Teir fóru frá húsum kl. 14 og vóru aftur í Kunoy kl. 20.30.

Djóni sigur, at hugskotið til at seta plátuna á Kúvingafjall fingu hann og Sjúrður í 2007, tá teir hugdu eftir nøkrum myndum, teir høvdu tikið summarið fyri á Kunoyar harðbaldnu hæddum.

Í hesum sambandi fingu teir hugskotið um at seta eina plátu við nøkrum mergjaðum orðum á hægsta fjall á Kunoynni, »Kúvingafjall«, sum hevjar seg upp á 831m.

Djóni gongur nógv í fjøllunum. Seinasta summar var hann á øllum teimum 10 fjøllunum í Føroyum, sum eru oman fyri 800 m. Av teimum eru seks á Kunoynni. At síggja oyggjarnar frá hæddunum er nakað serligt. Túrarnir á 800 m fjøllunum hava sjálvsagt skunda undir ætlanina við at seta koparplátuna upp á »Kúvingarfjalli«, sigur Djóni.

Koparplátan er 30x38 cm til støddar og 4 mm tjúkk. Skriftin er graverað 1,5 mm niður í plátuna, sum er boltað føst í ein stóran stein ovast á Kúvingarfjalli.

Á plátuni stendur: »*Tær heiður alvaldandi himlarnir bera, í toru finnur rødd tín veg, og jørðin og havið, tey navn títt høgt gera, hitt skapta alt ber boð um teg*« (Christian F. Gellert – Victor Danielsen týddi). »*Alt síðan Kúvingafjall varð til, hava klettar, gil og røkur verið tey somu – Fløtan so fríð á hásummartíð- sum tá fedrar higar komu*«. (orð Djóni Kunoy - skrivað á Kúvingafjalli 27. juni 2009). »*Kom klúgv hæddirnar saman við mær. Vakrast eru blómurnar har ringast er at ganga*«. (orð Karstin Hoydal). »*Røkurnar troddar í øldir áðrenn vit náddu fram*« (orð Rani Nolsøe). »*Fjøllini tey reystu kunnu svíkja, Heyggjar flyta seg úr stað, men Guds miskunn ei frá tær skal víkja, alt Guds orð ber prógv um tað*« (Esaias 54.10) og »*Sannroynist hetta øllum, ið ferðast á Kunoyar fjøllum! Hoyrir tú tigandi kallið á vindbarda Kúvingafjalli?*« (orð Zacharias Zachariassen). »*Á summri 2010: Regin Kunoy, Sjúrður Kunoy, Steffan Kunoy og Djóni Kunoy*«.

Djóni sigur, at hann vil gjarna takka Richardi Danielsen í Fuglafirði (soni Victor Danielsen), Gunnari Hoydal í Havn (soni Karsten Hoydal), Rana Nolsøe í Klaksvík og Zachariasi Zachariasen í Gøtu fyri at vit fingu loyvi at nýta sitatini til koparplátuna, sum nú stendur á Kúvingarfjalli.

Annars er ein onnur pláta sett upp á Kunoyranakki, norðast á Kunoynni. Tað var í 1972. Teir sum hava sítt navn graverað har eru: Jens Juel Sólbjørg, Klaksvík, Páll Klettskarð, Haraldssund, Símun Petur Rasmussen, Haraldssund, og Johan Purkhús, Klaksvík.

*maggi@sosialurin.fo*



*Brøðurnir Sjúrður og Djóni Kunoy við koparplátuni*



*Panorama útsýni*